**POLITIKKUR & SAMFELAG**

Bispur um tingfund sunnudag:

# Ov seint at tala at



**Persónliga sær bispur tað ikki sum nakra gølu, at tingið í ár verður sett sunnudag. Men hann heldur, at tingfólk og kirkjuligi myndugleikin áttu at havt gjørt vart við seg, tá tað bleiv lógarfest, at tingið skal setast ólavsøkudag, sjálvt um hann fellur á sunnudag**

TINGFUNDUR
*John Johannessen*

– Vit mugu bara finna okkum í, at tað er staðfest við lóg, at tingið skal setast sunnudag, um ólavsøkudagur er sunnudag

Hetta sigur Hans Jacob Joensen, føroya bispur, í sambandi við kjakið, um hvørt tað er rætt ella skeivt, at løgtingið á ólavsøku í ár verður sett ein sunnudag.

– Nýggja stýrisskipanin er samtykt av tveimum løgtingum og tingfólk hava havt góða tíð at viðgera málið, men eingin gjørdi vart við seg tá, ásannar bispur.

Heldur ikki kirkjuligi myndugleikin gjørdi vart við seg, tá tað varð lógarfest, at tingið skal setast sunnudag. Tí spyrja vit bisp, um ikki kirkjan sjálv eigur eitt sindur av ábyrgdini av, at fyrsti arbeiðsdagur hjá tingfólkum í ár verður sunnudag.

– Eg var ikki bispur, tá nýggja stýrisskipanin varð viðgjørd. Eg var tá ikki annað enn ein gemenur prestur. Men tað er rætt, at eg sum gemenur prestur kanska burdi sagt okkurt tá. Málið skuldi verið tikið upp tá, so vit fingu diskuterað tað ígjøgnum tá í staðin fyri nú, sigur bispur. Og hann leggur afturat, at var hann bispur tá og hevði fingið spurningin til viðgerðar, hevði hann mælt frá, at tingið verður sett sunnudag.

Í hesum sambandi heldur Hans Jacob Joensen, at tað hevði verið eitt gott hugskot at tikið spurningin upp í sambandi við fyrireikingarnar til eina komandi føroyska grundlóg ella eina endurnýggjaða stýrisskipanarlóg.

Persónliga heldur bispur tað kortini ikki vera nakra gølu, at tingið í ár verður sett sunnudag. Men honum hevði dámt best, um kirkjugongdin og skúðgongan vórðu hildin sunnudag, og at tingið varð sett mánadagin eftir.

Hendrik Old um tingfund sunnudag:

# – Eg ætli mær framvegis ikki at møta

**Tað er greitt staðfesti við lóg, at tingið skal setast sunnudag, um ólavsøkudagur fellur á ein sunnudag. Men Hendrik Old ætlar sær framvegis hvørki at ganga skrúðgongu ella møta á tingfundi. Hann sigur seg vilja staðfesta, at sunnudagur er frídagur hjá øllum**

TINGFUNDUR
*John Johannessen*

Hendrik Old, tingmaður, stendur fast við mótmæli sítt móti ætlaða tingfundinum sunnudagin á ólavsøku.

– Tað kemur ikki upp á tal, at eg møti til tingfundin ella skrúðgonguna á ólavsøku, sigur Hendrik Old.

Tað er greitt staðfest í nýggju stýrisskipanarlógini, at tingið skal setast ólavsøkudag klokkan 13, sjálvt um ólavsøkudagur fellur á ein sunnudag. Tí hevur Hendrik Old skyldu at møta til tingfundin sunnudagin 29. juli, eins og hann hevur skyldu at møta til aðrar tingfundir.

Men Hendrik Old fer ikki á tingfund.

– Vit hava eisini eina halgidagslóg, ið sigur, at tað ikki skal arbeiðast sunnudag. Hana ætli eg mær at virða.

– Fyri meg er hetta málið ikki ein átrúnaðarligur spurningur. Hetta er ein spurningur, um tingið skal virða, at sunnudagurin er frídagurin hjá øllum. Gongdin í samfelagnum í dag er, at sunnudagurin meira og meira verður gerandisdagur, so tímalønt fólk eru noydd at arbeiða sjey dagar um vikuna. Og eg haldi, at tingið má ganga undan at vísa, at sunnudagurin er frídagur. Serliga nú, vit fara inn í oljuvinnuna.

– Eg havi sjálvur fiskað nógvar sunnu- og halgidagar, men samstundis havi eg síðani sjeytiárini havt samband við reiðarar í Skotlandi, sum hava fleiri nótaskip. Teir hava aldri verið heimanífrá ein sunnudag, men kortini hava teir ráð at skifta skip fimta og sætta hvørt ár og eru peningarliga sera væl fyri, sigur Hendrik Old.







**POLITIKKUR & SAMFELAG**

# Løgreglan verður donsk

**Løgreglan og ríkisfelagsskapurin hanga saman. Tí sleppa føroyingar ikki at yvirtaka løgregluna, so leingi vit eru í ríkisfelagsskapi við Danmark. Hetta hevur fakfelagssamskipanin hjá løgregluni, COII, fingið at vita frá forsætisráðharranum**

YVIRTØKA
*John Johannessen*




*Føroyingar fáa ikki ræði á løgregluni, fyrr enn Føroyar eru farnar úr ríkisfelagsskapinum. Hetta er niðurstøðan í einum svari frá danska forsætisráðnum til fakfelagssamskipanina hjá donskum tænastumonnum*

Løgreglan verður ikki føroysk, fyrr enn vit gera av at fara út úr ríkinum.

Hetta er sambært Fregnum niðurstøðan í einum svari frá Poul Nyrup Rasmussen til COII, fakfelagssamskipanina hjá donskum tænastumonnum, um ætlaðu yvirtøkuna av løgregluni.

Poul Øland, sum er ein av leiðarunum í COII, sigur við Fregnir, at hann gjøgnum embætismenninar hjá Nyrup hevur fingið at vita, at løgreglan er ein partur av ríkisfelagsskapinum. Og so leingi ríkisfelagsskapurin er til, er løgreglan ein partur av honum.

### Steðgaðu fyrireikingunum

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, setti fyri tíð síðani eina nevnd at fyrireika eina føroyska løgreglu. Í nevndini vóru eisini umboð fyri Føroya Politistafelag, sum gjøgnum danska politistafelagið er limur í COII.

Men fyri viku síðani fóru umboðini fyri Føroya Politistafelag úr nevndini eftir boðum frá COII. Danska tænastumannafelagið helt, at arbeiðið í fyrireikingarnevndini var vorðið ov politiskt.

Poul Øland frá danska COII sigur í hesum sambandi við Fregnir, at felagið valdi at taka seg og sínar limir úr fyrireikingunum, tí tað bleiv greitt, at føroyingar vóru í ferð við »en politisk manøvre«, og at arbeiðið í nevndini var ein politisk uppgáva.

– Vit høvdu vitjað verið við, um hetta var ein faklig uppgáva um at tryggja starvsfólkaviðurskiftini. Men tað er tað ikki. Tí tóku vit okkum og okkara fólk úr nevndini, sigur Poul Øland við Fregnir.

Formaðurin í COII, Tommy Agerskov Thomsen, sigur, at avgerðin um at fara úr fyrireikingarnevndini einki hevði við brævið frá Nyrup at gera. Hann staðfestir, at hann persónliga tók avgerðina út frá egnum metingum, um at arbeiðið var vorðið ov politiskt.

Føroyskt mál við donskum ræði

Poul Nyrup Rasmussen hevur áður meldað út, at hann góðtekur, at løgreglan verður yvirtikin. Tí er ikki sørt ósamsvar millum hesar útmeldingar og svarið til COII.

Men sum skilst, hevur Poul Øland frá COII fingið at vita frá forsætisráðharranum, at tað kortini ber til at skipa eina føroyska løgreglu. Men at evsti myndugleikin yvir henni skal liggja hjá danska løgmálaráðharranum.

Sosialurin hevur roynt at fáa viðmerkingar frá danska forsætisráðharranum, Poul Nyrup Rasmussen, men boðini frá skrivara hansara eru, at hann er í summarfrí, og tí ikki hevur møguleika at svara.

